FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið

Tórshavn, 13. oktobur 2020

J.Nr.: 20/00444

Svar til skrivligan fyrispurning frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, um óstøðugu siglingina hjá Smyrli, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum Jørgeni Niclasen

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Metir landsstýrismaðurin, at støðan á Suðuroyarleiðini er nøktandi, nú tað er so trupult at halda ferðaætlanina?

2. Eru nakrar ætlanir um at gera nakað við støðuna?

3. Er ætlanin at fáa nakrar farmatúrar sigldar t.d. um náttina, møguliga við øðrum skipi?

4. Er nøkur ætlan at økja um túratalið hjá Smyrli og at betra um tænastuna?

Svar:
Framburður er í Suðuroy og tað fegnast vit øll um. Ferðafólkatalið og talið av bilum veksur alsamt á Suðuroyarleiðini, og serliga farmaflutningurin er nógv vaksin. Hetta vegna gongdina innan fiskivinnu í Suðuroy, við stórum virkjum, sum framleiða til útflutnings. Harumframt er flutningur suður hjá handlum, byggifyritøkum og smiðjum av vørum, tilfari og rávørum. Siglingin hjá Smyrli er í løtuni einasta veruliga ferðasamband millum Suðuroy og meginøkið í Føroyum, og skal siglingin sjálvandi verða støðug og góð, til gagns fyri fólk og vinnulív.

Av og á er Smyril fullfermdur. Serliga í Havn kunnu trupulleikar verða í sambandi við av- og áskipan tí har kann verða trongligt, vegna ymiskt annað vinnuligt virksemi á havnarlagnum. Hetta kann merkja, at ferðaætlanin ikki kann haldast. Farmurin sum fer við Smyrli er fyri tað mesta í 40 fót bingjum ella í sonevndum lastum, tað eru køli- ella frystibingjur á hjólum, soleiðis at tær verða sleipaðar um borð og í land. Tað fara í miðal 140 sleip hvønn veg um vikuna, um 4.000 tons samanlagt.

Saman við Tórshavnar Havn ætlar Strandferðslan at tryggja, at virksemið verður lagt betri til rættis komandi summar, tá ið nýggja havnarútbyggingin í Havn er tikin í brúk. Ætlanin er eisini at kanna um tað ber til hjá Smyrli at sigla skjótari. Serfrøðingar frá RolsRoyce/Kongsberg eru á veg til Føroyar at gera hesar kanningar.

Á Strandferðsluni verður arbeitt við eini nýggjari prísskipan og bíleggingar skipan. Við slíkari skipan fer at bera betur til at tilrættaleggja arbeiðið, og at hækka inntøkurnar hjá Strandferðsluni, sum skulu brúkast til at menna tænasturnar hjá Strandferðsluni, herundir farmaflutning.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

MINISTRY OF FINANCE

Strandferðslan upplýsir, at á flestu túrum er minni farmur, og eingir trupulleikar. Strandferðslan sigur, at hon fer saman við vinnuni at skipa farmaflutningin soleiðis, at mongdirnar av farmi til einstøku túrarnar verður javnari.

Landsstýrismaðurin arbeiðir við málinum, og verður fundur nú við Strandfaraskip landsins, fyri at finna eina loysn á Suðuroyarsiglingini, soleiðis at ferðaætlanin kann haldast.

Tinganes, 13. oktobur 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður